*Nýggjur landsstýrismaður tekur samgonguna á bóli:*

# Flytur skúla úr Havn og suður á Tvøroyri

*Torbjørn Jacobsen gjørdi hósdagin av, at nýggju almanna- og heilsuútbúgvingarnar skulu vera á Tvøroyri og ikki í Havn, sum ætlanin hevur verið*



Áki Bertholdsen

Torbjørn Jacobsen, nýsettur landsstýrismaður í skúla- og mentmálum sat ikki leingi, áðrenn hann slepti teirri fyrstu bumbuni.

Tí hósdagin kunngjørdi hann, at tær nýggju almanna og heilsuútbúgvingarnar, sum ætlanin er at seta á stovn nú, skulu ikki vera í Havnini, sum tað annars hevur verið ætlanin.

Nýggi almanna- og heilsuskúlin skal vera á Tvøroyri.

Tað var tá ið hann hevði orðið undir viðgerðini av ólavsøkurøðu løgmans, at Torbjørn Jacobsen kom við hesum óvæntaðu tíðindunum.

Og tað var skilligt, at alt tingið varð fullkomiliga tikið á bólið av hesum tíðindum.

Bæði tinglimir úr samgongu og úr andstøðu søgdu, at teir høvdu ikki minsta varhugan av, at ætlanin at leggja skúlan í Havn, var broytt.

Serliga barsagdur var Bjarni Djurholm úr fólkaflokkinum sum segði, at tað bleiv ikki uttan svørðslag, at skúlin bleiv fluttur.

Hetta skal kanska síggjast í ljósinum av, at tað hevur verið eitt hart politiskt stríð um, hvar skúlin skuldi vera.

Tingmenn úr Vágum vildi hava hann har vesturi og aðrir tingmenn hildu, at hann lá best í Havnini.

Úrslitið var, at ein nevnd kom til ta niðurstøðu, at tað var rættast at leggja skúlan í undir sjúkrasystraskúlan í Havnini, tí so bleiv skúlin bíligari at reka við tað, at tað fór at bera til hjá báðum skúlunum at samstarva, eitt nú um lærarar. Víst varð eisini til fyrimunirnar við at Landssjúkrahúsið var á staðnum, har næmingar kundi vera í venjing.

*Hósdagin loypti Torbjørn Jacobsen hvøkk á tinglimir, tá ið hann kunngjørdi, at gjørt av at flyta ein nýggjan skúla úr Havnini og suður á Tvøroyri*

Signar á Brúnni, sum tá var landsstýrismaður á økinum, gjørdi av at fylgja tilmælinum og at leggja skúlan í Havn.

Men nú hevur eftirmaður hansara í landsstýrissessinum hansara, Torbjørn Jacobsen, so tikið eina aðra støðu.

Hinvegin vóru tað eisini fleiri, sum tóku undir við Torbjørn Jacobsen, ikki minst tingmenn úr Suðuroynni, men eisini aðrir.

Skúlin skal byrjað 1. januar og nú skulu høli á Tvøroyri útvegast til endamálið.

Á skúlanum eru tvær útbúgvingar.

Onnur er ein styttri almanna- og heilsuhjálparaútbúgving, sum tekur eitt ár og sum er ein eftirútbúgving av heimahjálpum.

Hin er ein útbúgving sum almanna og heilsurøktari, sum tekur hálvtannað ár.

# Ætlar bróta múrin um Havnina niður

*At flyta nýggja almanna- og heilsuskúlan úr Havnini og suður á Tvøroyri, er ein roynd at bróta múrarnar rundanum Havnina*



*– Verður tað neyðugt, er tað onki í vegin fyri at flyta lærarar úr Havnini og suður á Tvøroyri, sigur Torbjørn Jacobsen*

Áki Bertholdsen

– Tað er neyðugt at bróta múrarnar rundanum Havnina niður.

Torbjørn Jacobsen, landsstýrismaður, sigur, at tað var orsøkin til, at hann nú hevur gjørt av at flyta nýggja almanna- og heilsuskúlan úr Havnini og suður á Tvøroyri.

– Verður tað ikki politiski myndugleikin, sum tekur stig til at bróta múrarnar niður, so koma vit ongan veg á økismenningarleið, sigur tann nýggi landsstýrismaðurin hjá tjóðveldisflokkinum í skúla- og mentamálum.

– Allar nevndir, og øll ráð, sum gera tilmæli um eitt og annað, eru fólk, sum búgva innanfyri bøgarðarnar í Havn, og teirra sjónarringur røkkur heldur ikki ut um Havnina.

– Tí er niðurstøðan í øllum tilmælum, sum eru komin, og sum fara at koma, altíð, at alt skal verða í Havnini.

Torbjørn Jacobsen sigur, at tað tí er neyðugt hjá landsstýrinum at gera bart og at leggja skúlar og stovnar úti um landið.

– Og kunnu vit ikki so frægt sum leggja ein skúla sum hendan uttanfyri Havnina, koma vit onga leið.

Hann sigur, at hendan samgongan hevur júst sett økismenning ovaliga á síni virkisskrá.

–Tí er tað fult út í samsvari við politikkin hjá samgonguni, at nýggi skúlin verður fluttur úr Havnini, suður á Tvøroyri.

**Ongin trupulleiki**

Ein orsøk til, at skúlin skuldi vera í Havnini, var, at so bleiv hann bíligari at reka, m.a. tí at hann kundi hava felags lærarar við sjúkrasystraskúlan.

Men hesa grundgevingina heldur Torbjørn Jacobsen lítið um.

– Hvat skal vera í vegin fyri at flyta lærarar suður á Tvøroyri, um tað verður neyðugt? Við nýggja Smyrli fer tað at taka ein og ein hálvan tíma at sigla suður.

Hvat er tað at tosa um?

Ein danir súkklar gleðiliga tveir tímar til arbeiðs hvønn morgun, uttan at grenja um tað.

Hann minnir eisini á, at tey, sum hava fingið hesa útbúgvingina frammanundan, hava verið noydd at fara líka til Danmarkar. Og tað er hóast alt munandi styttri suður á Tvøroyri, heldur hann.

Torbjørn Jacobsen leggur afturat, at hann hevur ikki sæð nakað roknistykki, sum vísir, at tað er bíligari at hava skúlan í Havnini, enn á bygd.

Tvørtur ímóti heldur hann, at tað er ein „miðsavningarmyta“, sum ongin enn hevur torað at brotið, at alt er bíligari í miðstaðarøkinum.

– Ein grundgeving fyri at leggja útbúgvingina í Havn, var at hon mátti vera tætt við eitt sjúkrahús.

– Men tað er ongin sum sigur, at tað avgjørt skuldi vera tætt við Landssjúkrahúsið.

– Tað kann akkurát tað sama verða tætt við Suðuroyar Sjúkrahús, sum er eitt nýmótans sjúkrahús, við sera góðum umstøðum, og man vera eitt tað nýggjasta sjúkrahúsið í Norðurlondum, sigur Torbjørn Jacobsen.

**Fegnast**

Dan Nielsen, býráðsformaður á Tvøroyri, sigur í eini stuttari viðmerking, at hann fegnast stórliga um avgerðina hjá landsstýrismanninum, og at skúlin skal vera vælkomin á Tvøroyri.

– Og byggilendi, tað trýtur ikki í kommununi og vit hava eitt nýmótans sjúkrahús, so tað skuldi ikki verið nakar trupulleiki.

– Tað skal vera løgið, um hetta ikki fær fulla undirtøku, tá ið vit hava í huga, at samgongan hevur sett økismenning sum eitt høvuðsendamál í politikkinum, leggur hann afturat.

# Foreldur í Sumba fáa nú dagrøkt

*Í Sumbiar kommunu fáa borgararnir nú eitt tilboð afturat, men bygdaráðsformaðurin veit ikki, um tørvur er á tí*



Áki Bertholdsen

**Sumba**: Tað eru nú nógvar kommunur í Føroyum, sum eru farnar at geva foreldrum tilboð um barnaansing.

Hetta er helst ein ásanning av, at í fleiri og fleiri húskum eru tað bæði foreldrini, sum arbeiða úti.

Nú er eisini Sumbiar Kommuna farin at bjóða sínum borgarum barnaansing. Kommunan hevur søkt í bløðunum, at eru foreldur, sum hava tørv á barnaansing, so kunnu tey siga kommununi frá. Tey, sum vilja hava børní ansing, skulu hava sagt kommununi frá hálvan august.

Jacob Vestergaard, bygdaráðsformaður í Sumbiar Kommunu, sigur, at ætlanin við lýsingini í bløðunum er mest fyri at kanna tørvin.

Hann sigur, at av og á eru graml at hoyra um, at foreldur sleppa ikki til arbeiðis, tí tey fáa ikki børnini ansað.

Men nú skal so hendan kanningin vísa, um hetta bara er prát, ella um tørvurin er veruligur.

Og vísir tað seg, at tørvur er á ansingarplássum, er kommunan sinnað at skipa fyri ansing til tey børnini.

Ætlanin er ikki at byggja barnagarð, men at útvega dagrøktarpláss til børnini, sum hava brúk fyri ansing.

Sjálvur heldur Jacob Vestergaard ikki, at tørvurin er serliga stórur.

Tað er av teirri einføldu orsøk, at tað eru so fá børn í kommununi. Hann sigur, at í Lopra og á Økrum, sum eisini eru í kommununi, eru bara tvey børn undir skúlaaldur. Hvussu nógv eru í sjálvum Sumba, er hann ikki heilt greiður yvir, men eftir, hvat vit skilja aðrastaðni frá, eru tey helst færri enn 10. Annars hevur Sumbiar Kommuna havt avtalu við dagrøktina í Porkeri um barnaansing. Dagrøktin í Porkeri er ikki fullsett, so børn úr Sumba hava kunnað verið í dagrøkt í Porkeri. Men bygdaráðsformaðurin ásannar, at hetta er nakað óhøgligt, tí ætlar Sumbiar Kommuna sjálv undir dagrøkt.



# Nýggjur sjúkrahúsleiðari gleðir seg til uppgávuna

*– Eg hugsaði meg væl um, áðrenn eg søkti, sigur 34 ára gamli Jóanis Erik Køtlum, sum nú verður nýggjur landssjúkrahúsleiðari*



Niclas Johannesen

Bert eina viku aftan á, at umsóknarfreistin var úti, hevur landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum Helena Dam á Neystabø sett nýggjan sjúkrahúsleiðara fyri Landssjúkrahúsið.

Millum teir tríggjar umsøkjararnar til heita sessin á tí stríðsrakta sjúkrahúsinum fall valið á Jóanis Erik Køtlum. Hann er ættaður av Viðareiði og hevur síðani juli 1998 arbeitt sum fulltrúi í umsitingini á Almanna- og Heilsumálastýrinum. Eitt stutt skifti arbeiddi Jóanis Erik eisini sum fíggjarleiðari á Landssjúkrahúsinum.

– Hetta var tó bert nakrar fáar mánaðir í sambandi við bygnaðarbroytingarnar í 1998, sigur Jóanes Erik Køtlum.

Nýggi leiðarin kennir sostatt fullvæl til tær rembingar, ið seinastu árini hava tyngt virksemið á Landssjúkrahúsinum. Eitt stríð um bygnaðarbroytingar, sum kostaði undanmanninum hjá Jóanis Eriki Køtlum - Jákupi Mørkøre - sessin, tá Helena Dam á Neystabø sendi hann til hús tíðliga í ár. Jákup Mørkøre hevur síðani stevnt landsstýrismanninum.

Jógvan Elias Thomasen hevur virkað sum fyribils leiðari seinasta hálva árið.

**Spennandi avbjóðing**

– Sjálvsagt hugsaði eg meg væl um, áðrenn eg søkti, sigur Jóanis Erik Køtlum.

- Við nýggja leiðslustrukturinum trúgvi eg tó, at hetta kann gerast ein spennandi uppgáva, leggur hann aftrat.

Komandi stjórin, sum tekur við starvinum 15. august, vil tó ikki avdúka, hvørjar ætlanir hann hevur.

– Nei, tað vil eg helst ikki. Hetta er eitt sindur feskt enn.

Jóanis Erik Køtlum vísir á, at talan er um eina trý manna leiðslu á Landssjúkrahúsinum og hann ætlar at tey skulu seta seg niður og síðani koma við eini felags boði upp á, hvussu Landssjúkrahúsið skal virka sum frægast undir nýggja bygnaðinum.

**Tilmæli**

Tað ein 6 manna setanarnevnd er komin við tilmæli til Helenu Dam á Neystabø.

Arbeitt hevur verið serstakliga skjótt, tí tað er ikki meira enn ein vika síðani, at freistin at søkja var úti. Nevndin er mannað av tveimum umboðum frá Almanna- og Heilsumálastýrinum, tveimum umboðum frá ovastu leiðsluni á Landssjúkrahúsinum, einum millumleiðara á deildunum umframt einum umboði fyri starvsfólkini; nevniliga næstformaðurin í samstarvsnevndini.

Jóanis Erik Køtlum er útbúgvin cand merc við sergrein í fíggjarstýring. Hann er settur í leiðarastarvið fyri fimm ár. Og hetta hevur hann onki ímóti tíðaravmarkaðu starvssetanini.

– Tað dámar mær væl. Viðhvørt skulu frískar kreftir til.

# Akraberg landar í Klaksvík

**Klaksvík:** Akraberg kom hóskvøldið til Klaksvíkar, og í gjár landaði hann á Northern Fish Cold Storage.

Akraberg hevur millum 70 og 80 tons av kongafiski, sum hann hevur fiskað í Irmingarhavinum.

Fyrrapartin í gjár varð roknað við, at Akraberg var liðugur at landa á middegi í gjár.

*ek*

# Bróður-dóttir Gorbatjov í Føroyum

Jústinus Leivsson Eidesgaard



Í gjár vóru fyrstu sýningarnar hjá sirkusinum Agora í Føroyum. Tær vera hildnar í kring Vøruhúsið á Hjalla í Havn. Bróðirdóttir kenda sovjetiska leiðaran Michael Gorbatjov er ein av sirkusmanningini. Sirkusið hevur ikki djór við. Tað er ikki loyvt í Føroyum. Men har er nógv á skránni, millum annað sum eru sera dugnalig á trapezini. Í dag vera sýningarnar klokkan trý og klokkan seks seinnapart og somuleiðis í morgin.